Sirið Stenberg
Hervør Pálsdóttir
Aksel V. Johannesen
Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot
til
3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 64/2020 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Víðkan av stýri, heimild at útvega lutaíbúðir, heimild at veita ráðgeving um alternativar byggihættir, økt lánsheimild til bústaðabygging, heimild at stovna partafelag o.a.)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 1 verður strikað.
   § 1, nr. 2-6 verða eftir hetta § 1, nr. 1-5.

2. Í § 1, nr. 5, (sum verður § 1, nr. 4) verður § 8 c, stk. 2 orðað soleiðis:

   "*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. Harafturat skulu 200 mió. kr. fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin og Húsalánsgrunnurin gera avtalu um, hvørjar bústaðaverkætlanir skulu gerast."

3. Í § 1, nr. 5, (sum verður § 1, nr. 4) verður § 8 c, stk. 3 og 4 strikað.

4. § 2, stk. 2 verður strikað.

Viðmerkingar
Talan er um sama broytingaruppskot, sum minnilutin í Trivnaðarnevndini setti fram í álitinum til 2. viðgerð av málinum.

Til nr. 1:
Stýrið verður ikki broytt. T.v.s. at har skulu bert verða 3 limir og ikki 5 limir.

Til nr. 2:
Stk. 2 verður broytt soleiðis, at av teimum 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. Landið verður sæð sum ein heild og ikki býtt upp í øki, har treytirnar eru ymiskar, um grundarlag er fyri kapping ella ikki.

Í staðin fyri, at landsstýrismaðurin skal góðkenna staðseting og málbólk fyri verkætlanir til serligar málbólkar, so verður hetta broytt til, at landsstýrismaðurin og Húslánsgrunnurin gera eina avtalu um, hvørjar bústaðaverkætlanir skulu gerast.

Til nr. 3:
§ 8 c, stk. 3 og 4 verður strikað.

Til nr. 4:
Talan er um eina fylgibroyting til nr. 1. Stýrið verður, sum tað er.

Á Løgtingi, 25. mars 2021

Sirið Stenberg Hervør Pálsdóttir

Aksel V. Johannesen Djóni Nolsøe Joensen